Burðardygg Ferðavinna.

Hetta lógaruppskotið verður ein vanlukka fyri alt okkara vakrað Føroya land og fólk.

Føroyingar Føroyar verða lagdir á blik, fyri øllum heiminum, fyri nakrar fáar krónur.

Vit verða gestir í egnum landi !

Eingin verður, sum tekur sær av trygdini.

Hví ?

Allur heimurin sleppur at vála og slóma ella fara uppá land , har tey vilja og nær tey vilja, fyri bert nakrar fáar krónur.

Ìslendingar sleppa framat ferðavinnuni sum teimum listir, sambart Hoyvíkssáttmálanum, uttan forðingar.

Aldargamlir siðir og reguleringar innan landbúnaðin verða skúgvaðir til viks.

Rakstur av høgunum og seyðarakstur verður burtur.

Hagastýrir, hagastevnir og grannastevnur, sum er ein tann mest demokratiska skipan vit hava verður undirgrivin.

Landbúnaðarstevnur og yvirlandbúnaðarstevnur. Sum er tryggja við dómsvaldinum (sorinskrivaranum), verður gjørt til einki.